# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Andstøðuleiðararnir skulu vita, at vit eru til reiðar at taka teir, um tað so er á alljósum degi*

*Robert Mugabe*



*Fidel Castro prátar við bróðurin Raul og Hugo Chavez*
*Mynd: Kubanska sjónvarpið*

# Fidel er ikki deyður

**Fyri fyrstu ferð í seks mánaðir hevur kubanska sjónvarpið víst myndir av Fidel Castro**

Fyrrverandi kubanski leiðarin Fidel Castro hevur ikki verið á sjónvarpsskíggjanum, síðani hann hitti brasilska forsetan, Luiz Inacio Lula da Silva, tá hesin var á vitjan í Kuba í januar. Alment hevur Castro ikki verið frammi, síðani hann bleiv sjúkur fyri skjótt tveimum árum síðani, og tí hava fleiri gitt, hvar hann mundi vera, og um hann kanska var deyðsjúkur.

Men nú hevur kubanska sjónvarpið manað allar gitingar í jørðina. Sjónvarpið vísti í gjár myndir av Castro saman við bróðurinum og eftirmanninum Raul Castro og venesuelska forsetanum, Hugo Chavez.

Eygleiðarar siga, at tann 82 ára gamli Fidel tóktist vera væl fyri likamliga og í góðum hýri.

Fidel Castro fór frá í februar eftir at hava verið kubanskur leiðari í næstan 50 ár. Bróðurin Raul tók við.

# Høgra hond Bin Ladens í Evropa latin leysur

**Abu Qatada, sum sigst vera høgra hond hjá yvirgangsleiðaranum Osama bin Laden í Evropa, varð í dag latin leysur úr varðhaldi í Bretlandi**



*Abu Qatada er latin leysur, men er undir sera strongum eftirliti*
*Mynd: Polfoto*

Tað er kærustovnurin í innflytaramálum, sum hevur gjørt av, at Abu Qatada skal sleppa úr varðhaldinum, men stovnurin leggur fleiri treytir við. Abu Qatada skal altíð hava eina elektroniska fótleinkju um annað beinið, so myndugleikarnir altíð kunnu vita, hvar hann er staddur, og hann sleppur bara út fyri dyr tveir tímar um dagin.

Herumframt fær Abu Qatada forboð fyri at tosa við ávís fólk, teirra millum Osama bin Laden og næsta mann hansara í al-Qaeda, Ayman al Zawahiri. Hann sleppur heldur ikki at tosa í fartelefon ella ígjøgnum teldu ella aðra samskiftisútgerð. Hann kann ikki taka ímóti gestum uttan loyvi frá myndugleikunum burtursæð frá smábørnum, sum hann er í ætt við. Hann sleppur heldur ikki í moskurnar at biðja.

Fyri 10 árum síðani bleiv Abu Qatada dømdur í Jordan fyri at hava verið uppi í yvirgangi. Talan var um fráverudóm, og tí hava bretsku myndugleikarnir roynt at fáa hann útvístan til Jordan, men Abu Qatada legði málið fyri dómsvaldið og vann har.

Bretska ákæruvaldið sigur, at Abu Qatada hevur eggjað ungum muslimum til at gerast píslarváttar, og amerikanarar siga, at nakrar av prædikum hansara vórðu funnar í einari íbúð í Hamburg. Í íbúðini búðu nakrir av teimum, sum vóru við í yvirganginum í USA 11. septembur í 2001.

## STUTT SAGT

### Eftir Taliban

Afghanskir og kanadiskir hermenn fóru í morgun nundir eitt átak ímóti uppreistrarmonnum hjá Taliban, sum hava tikið seg fram nærhendis býnum Kandahar har suðuri í Afghanistan í seinastuni. Talsmaðurin hjá NATO, Mark Laity, segði í morgun, at teir fyrstu samanbrestirnir høvdu longu verið, men hann nevndi einki um møguligt mannfall. CNN sigur seg hava fingið at vita frá NATO-keldum, at umleið 800 uppreistrarmenn hjá Taliban eru komnir til leiðirnar við Kandahar ta seinastu tíðina.

### Prísurin ger mun

Vilja politikararnir hava fólk at leggja av at roykja, kann príshækking vera ein loysn, men tað er ikki vist, at tað er loysnin. Í USA vísir ein kanning, at amerikanarar roykja 18 prosent færri sigarettir nú enn í 2000, tá prísurin á sigarettum fór upp, samstundis sum onnur tiltøk vórðu sett í verk.

Men amerikanska kanningin vísir eisini, at amerikanarar keypa meiri tubbak at balla nú enn fyrr, og at teir keypa eisini meiri snús nú enn fyrr. Greg Connolly, sum hevur staðið fyri kanningini, sigur við AP, at meirnýtslan av balli og snúsi svarar til umleið ein triðing av tí, sum sigarettnýtslan er minkað. Greg Connolly heldur út frá hesum, at kanska ber tað ikki til at skerja roykingina meiri bara við príshækkingum.

